– trygt og ómakaleyst til hús



INNI

# Dámlig og dygdargóð hús í Sørvági

**Væl ber til at liva væl í stóru og snøggu húsunum í Sørvági, sum eru dagførd, so tey eru at kalla sum nýggj.**









## Fyrsta fatanin

Tú koyrir inn á blinda vegin í friðarliga bústaðarøkinum og býlinginum í Sørvági. Omanfyri er bøur og hagi, har frálíkt er hjá børnum at spæla og at trívast. Stutt er til barnagarð, skúla, svimjihøll og frítíðarskúla, og bátahylurin er nær við. Innkoyringin er stór og breið, og tú fært allar bilarnar inn í vakurt steinsetta túnið. Stóra garagan við nýggja elektriska portrinum er sera innbjóðandi, og tú kanst væl nýta hana til annað enn bilar – t.d. at halda veitslu í.

## Ljós og luft – stílur og snið

Inni er ljóst og liviligt. Tú kemur inn í eina ljósa hall við trappu til niðaru hædd. Trappan er vøkur sum eitt møbilstykki og góð at ganga í, so hon bindir hæddirnar saman á ein náttúrligan hátt. Hall'in gevur eitt gott uppbýti av húsinum, so tað er praktiskt og liviligt. Í nýgga køkinum kanst tú gleða teg um, at dygd og design ganga upp í eina hægri eind, og tú kanst sita við vindeyga og njóta frálíka útsýnið yvir bygdina og fjørðin.

## Niðasta hædd - uttanfyri og uttanum

Niðasta hædd er innrættað øll sum hon er. Har kann yngra ættarliðið liva og hugna sær í friði og náðum, um tey ynskja tað. Har er eisini fleiri praktisk rúm, har tú kanst breiða teg út og við ítrivi o.ø. Høvuðsinngongd er eisini til niðastu hædd, so hon kann nýtast sjálvstøðugt og fyri seg. Garður / urtagarður er uttanum, so uttanfyri er eisini møguleiki fyri at breiða seg, og tú kanst lættliga fáa alt leysafæ undir tak.

## Innrætting

Í ovaru hædd er inngongd, gongd / trappugongd / hall, matarkøkur / alrúm, borðsstova / stova, baðirúm, hjúnarrúm við baðirúmi og útgongd til altan, kamar / skrivstova við útgongd til garagu / bryggers / grovkøki / vaskirúmi. Í niðaru hædd er inngongd, durur, gongd / trappugong / alrúm, 2 kømur, goymslurúm (klárt at gera til baðirúm), fýrrúm / kjallararúm við egnari inngongd, vaskirúm og hjallur.

## Fakta

| | |
|---|---|
| **Adressa** | Undir Bólheyggi 4, Sørvágur |
| **Byggiár:** | 1987 / 2008 |
| **Hæddir:** | 2 |
| **Gólvvídd:** | 240 $m^2$ |
| **Grundøki:** | 718 $m^2$ |
| **Goymslurúm:** | 17 $m^2$ |
| **Bilhús:** | 28 $m^2$ |
| **Prísuppskot:** | kr. 2.000.000,00 |









PF inni
Niels Finsensgøta 37

Postboks 364
FO-110 Tórshavn

Telefon 35 42 00
inni@inni.fo

Sí fleiri hús á **inni.fo**